# Cube til ta tilvitaðu skrivstovuna

Tað er als ikki líkamikið hvørjir møblar standa inni á eini skrivstovu.

Stór krøv verða, og eiga at verða, sett til møblar og innbúgv, bæði fyri at starvsfólkini kunnu trívast og fremja sítt besta, og ikki minst fyri at viðskiftafólkini skulu kenna seg vælkomin.



Danska fyritøkan Cube Design hevur spesialiserað seg í at sniðgeva og framleiða skrivstovumøblar í minimalistiskum stíli, sum lúka øll hugsandi nútímans krøv til bæði stíl, útsjónd og ergonomiskar hentleikar. Talan er um dygdarmøblar, til lagaligar prísir.

HETTA ER SNIÐGEVING OG SNIKKARAHANDVERK Í DONSKUM SERFLOKKI!

Vøruútvalið er sera breitt, alt frá einfaldum og vanligum borðum til avanserað skriviborð í nýggjasta ergonomiska sniði við møguleika fyri at stilla hæddina inn sjálvur. Innan skrivstovuskáp og –reolir kann Cube Design nøkta einhvønn tørv, antin tað er at hanga upp á veggin ella at standa og/ella rulla á gólvinum. Cube Design ger eisini møblar, serliga til kundamóttøkur og kantinur.

Cube Design hevur tey seinastu árini verið í eini støðugari menning við tað at fleiri og fleiri hava fingið eyguni upp fyri dygdini í hesum møblum. Cube Design er tríggjar ferðir innan hesi seinastu fimm árini av blaðnum Børsen kosin at vera ein sokallað Gazelle-fyritøka. Henda heiðursløn verður givin til tær skjótast vaksandi fyritøkurnar í Danmark.

Nú er møguleiki at síggja, royna og fáa hendur á hesum vællýddu møblunum í Føroyum eisini. Tað er sp/f Byggitilfar við Hoydalsvegin í Havn, sum umboðar Cube Design í Føroyum.





Harald og Balli






## Sekkjastólur í lekrum sniði

Er ein sekkjastólur annað enn ein sekkur við turkaðum ertrum?

Ja, tað kanst tú gott spyrja, men avstralska sniðgevarafyritøkan Ambient Lounge hevur megnað at framleiða ein sekkjastól, sum er meira enn bara ein sekkur, men hinvegin ein stílfullur stólur í vøkrum sniðið. Sum saktans tolir at standa í eini stovu. Til júst stovubrúk fæst enntá ein sekkjastólur í vøkrum leðri.

Ein af fyrimununum við sekkjastólunum frá Ambient Lounge er, at teir eru gjørdir úr tilfari, sum tolir útibrúk. So um sólin skínir – tveit so sekkirnar út gjøgnum vindeygað og hugna tær á teimum uttanfyri – teir taka ikki skaða av, um eitt æl kemur.

Tað er sp/f Byggitilfar, ið umboðar sekkjastólarnar frá Ambient Lounge í Føroyum. Í framsýningarhølunum við Hoydalsvegin í Havn ber nú til at síggja og royna henda vælumtókta sekkjastólin, sum fæst í fleiri sniðum og litum. Og møguleikum fyri at seta sín egna dám á útsjóndina.

EITT GOTT JÓLAGÁVUHUGSKOT

### Ein øðrvísi jólagáva



Lýsingartilfar